ítróttur

Nr. 201 • hósdagur • 23. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hjálpti at rópa hart

Tað skundaði undir leiðsluna í FCK, at Todi Jónsson gav ilt av sær viðvíkjandi væntandi scanningini av einum skaða í lærkrikanum. Upprunaliga skuldi Todi bíða eftir hesum í tíggju dagar, men eftir at hann umvegis BT segði frá frustratiónum sínum um bíðitíðina, tók leiðslan annað skinn um bak. Á heimasíðu síniari sigur Todi frá, at hann skuldi til scanning mikudagin, men við evstamark okkara bar tó ikki til at fáa at vita, hvat úrslitið av hesum hevði verið.

**-jm**

# Svimjifundur



*Nýggja nevndin í svimjisambandinum avmyndað eftir aðalfundin*

**Svimjisamband Føroya hevði ársaðalfund leygardagin 18 okt. í Havn**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Á skránni var eisini væl av nevnd, og fyri valið stóðu Eli Stakksund, og Oluffa á Høvdanum, og vórðu tey bæði afturvald.

Nevndin í Svimjisamband Føroya sær soleiðis út:

Formaður:
Katrin Joensen
Næstformaður:
Eli Stakksund
Skrivari:
Oluffa á Høvdanum

Svimjisamband Føroya gevur á hvørjum ári út eina svimjihándbók, og bókin fyri svimjiarið 2003-2004 varð løgd fram á fundinum.

Henda bók er eitt gott amboð hjá svimjarum og øllum teimum í hava við svimjing at gera, og hevur Svimjisambandið eisin isent øllum feløgunum í landinum nøkur eintøk.

Í bókini finnur tú millum annað: metlistar, kappingarkalendara, myndir frá svimjiárinum ið fór, kravtíðir, svimjireglur og nógv annað.

# Máttu lúta fyri meistarunum

**Holte hevur eftir trý umfør í donsku landskappingini framvegis einki stig á kontini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroyska útisetafelagið í bestu donsku flogbóltsdeildini fyri menn, Holte, hevði um vikuskiftið vitjan av verandi donsku meistarunum úr DHG Odense. Roknað varð við, at talan var um sera møtumikla uppgávu hjá Holte, og úrslitið gjørdist eisini ein tryggur sigur til DHG. Við settúrslitunum, 20-25, 23-25 og 17-25, gjørdist talan um triðja ósigurin hjá Holte, sum enn er stigaleyst í botninum av talvuni.

Bárður B. Mikkelsen, sum er annar av føroysku leikarunum í Holte, sigur um dystin, at hann ikki var serliga væl leiktur fyri teirra viðkomandi. Serliga álopsspælið riggaði illa, og tó at Odense átti sigurin uppibornan, so komu teir nakað lætt til stigini, heldur Bárður.

Komandi dysturin hjá Holte í donsku kappingnini verður ikki fyrr enn 1. november. Undan hesum er tó talan um Top Teams Cup, sum er Europa-Cup kappingini í flogbólti, og har skal Holte spæla móti trimum øðrum liðum. Nevnliga Ozolnieke Poliurs úr Letlandi, Vegyesz Kazincbarcika úr Ungarn og Örkelljunga VK úr Svøríki.



# Farodane vann firmakapping

**Árliga uttandura firmakappingin hjá B36 varð leikt um vikuskifti. 23 virki tóku lut**

FIRMAKAPPING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Skrivstovumenninir hjá Farodane gjørdust fremstir í firmakappingini hesaferð, og fingu teir steypið frá Poul Hansen til ognar*

Um vikuskiftið skipaði B36 fyri uttandura firmakappingini, sum eftirhondini má sigast at vera eitt afturvendandi tiltak. Eitt tiltak, sum onkursvegna tykist møta vælvild frá veðurgudunum, tí hóast spælt verður í oktober- og onkra tíð í november mánaði, so hevur veðrið hvørja ferð verið leikarum og fyriskiparum til vildar.

Soleiðis var hesa ferð, tá tey 23 luttakandi liðini brustu saman. Nógvir dystir skuldu greiðast, áðrenn funnið varð fram til finalistarnar, sum hesa ferð vóru teldumenninir frá Farodane og rørleggjararnir frá Hans Dam. Her vístu teldumenninir seg at vera teir sterkastu, og eftir dystin kundu teir so fáa stóra steypið. Teir hjá Hans máttu soleiðis taka til takkar við øðrum plássinum, og á triðja plássinum kom so bilasølan hjá Wenzel.

Umframt at kappingini fyri virkini var eitt kærkomið høvi til at taka forskot upp á veturin, har fótbólturin og firmakappingar á nógvum starvsplássum hava høga raðfesting, so var tað fyri B36 liður í arbeiðinum at savna inn pening til uttanlandsferðir hjá yngru liðunum. Her plagar felagið at senda lið til kappingar uttanlands á hvørjum ári, og í so máta verður 2004 einki undantak.



*Rørleggjararnir hjá Hans Dam leiktu seg fram til finaluna, men har máttu teir so lúta*



*Wenzel Petersen mátti siga farvæl við gullið eftir hálvfinaluna, men tað mundi tó vera ein troyst, at teir kortini megnaðu at vinna bronsumerkini*

# Bridgeárið byrjað

**Fyrsta kappingin hendan veturin var í Vági, har Eysturoyar bridgefelag vann FM-heitið fyri feløg**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Kappingarárið hjá FBS fór av bakkastokki longu í september í ár, tá kappingin FM-Feløg varð leikt í Vági. Eitt lið úr hvørjum felag spældi um heiðurin at gerast føroyameistari fyri feløg. Kappingin var framúr væl fyriskipað, og eiga vágbingar stórt rós uppiborið. Sjálvdan hevur nøkur kapping verið meir spennandi enn tað sama. Tá ið roykurin hevði lagt seg, var tað Eysturoyar Bridgefelag, ið vann við einum impi. Bridgedeild Kaggans gjørdist nr. 2.

Eysturoyar Bridgefelag vann steypið til ognar, og framgongur endaliga støðan av yvirlitinum niðanfyri:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyar Bridgefelag | 110 |
| 2 | Bridgedeild Kaggans | 109 |
| 3 | Havnar Bridgefelag | 67 |
| 4 | Vágs Bridgefelag | 58 |
| 5 | Vágs Bridgefelag II | 51 |
| 6 | Nýggja Bridgefelagið | 40 |

**Á liðnum hjá Eysturoyar Bridgefelag vóru:**
Eyðun Anthoniussen og Robert Langaard - Dia Jacobsen og Hans Egil Rasmussen

Liðið hjá Bridgedeild **Kaggans:**
Bogi Simonsen og Símin Lassaberg - Heðin Mortensen og Jan Petersen

Sum nakað nýtt varð ein multihold útrokning gjørd yvir hesa kapping, multihold er ein útrokning sum á leið sigur, hvussu tey einkultu pøruni hava staðið seg í kappingini.

**Støðan í Mulithold:**
1 Bogi Simonsen og Símin Lassaberg 21,76
2 Eyðun Anthoniussen og Robert Langaard 19,56
3 Heðin Mortensen og Jan Petersen 18,56

Her er vert at leggja tilmerkis, at Heðin Mortensen og Jan Petersen, ið ikki hava spælt saman áður gjørdist nr. 3, eitt framúr úrslit hjá teimum báðum.

Komandi vikuskifti byrjar so kappingin hjá 1. og 2. deild aftur. Lagt verður til brots fríggjakvøldið kl. 19:00 í Bridgehúsinum í Tórshavn. Í 1. deild eru seks lið, meðan 2. deild telur 10 lið. Ávísar broytingar í reglugerðini eru framdar. Eitt nú kann nevnast, at øll pør, sum luttaka, skulu hava eitt væl útfylt systemkort (lítið). Brot á hesa reglu verður sektað við 2 kp. Reglugerð við broytingum sæst á heimasíðuni hjá bridgesambandinum, www.bridge.fo

Enn er gjørligt at melda lið til í 2.deild.

Skráin hjá Bridgesambandinum fyri veturin, 03/04 er annars hendan.
26. september FM-feløg Vágur
24. oktober, FM-lið, Tórshavn
14. november, FM-lið, Eysturoy
16. januar, FM-lið, Tórshavn
31. januar, Føroya Bjór, Simultan
28. februar, FM-pør, hálvfinala
12. mars FM-lið, endaumfar, Klaksvík
27. mars FM-pør, finala Tórshavn

FBS hevur avgjørt at senda 2 landslið við til EM, sum verður í Malmø í summar.

Kvinnulandsliðið er longu farið undir ávísar fyrireikingar, meðan tað opna landsliðið fer í gongd mánadagin 03.Nov. kl 19:00 í Bridgehúsinum í Tórshavn. Pør, ið hava hug at royna at koma við á landsliðið kunnu seta seg í samband við Róa á Rógvu Joensen samskipara ella Boga Simonsen, nevndarlim í FBS.